# Kappkoyrari fær dóm mánadagin

**Sakarmálið móti einum manni, sum í august mánað í ár saman við einum øðrum koyrdi kapp í „røntguni“ í Havn og rendi saman við ein annan bil, tá ið hann koyrdi móti ferðsluni, fær mánadagin at vita, hvør revsingin hjá honum verður.**

KAPPKOYRING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Bilurin hjá tí ákærda bilføraranum fekk stóran skaða, tá ið stoytti saman við ein mótkoyrandi bil uttan fyri Café Natúr náttina til mánadagin 8. august í ár.*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

Tann nú 30 ára gamli maðurin er ákærdur fyri fleiri brot á ferðslulógina, og harafturat er hann ákærdur sambært grein 252 í revsilógini, sum snýr seg um á skilaleysan hátt at seta lív og førleika hjá øðrum í vanda.

### Játtaði seg sekan

Málið var fyri í Føroya Rætti í gjár, og tann ákærdi bilførarin játtaði seg sekan í brot á ferðslulógina, men hann játtaði seg ikki sekan í at hava koyrt kapp. Hann segði, at tað var ikki nøkur ætlan um at koyra kapp, men tað bleiv til tað nakað, sum minti um tað.

Bilførarin greiddi frá, at hann hevði staðið parkeraður á parkeringsøkinum við Havnagøtu. Síðani koyrdi hann út frá parkeringsøkinum yvir móti rundkoyringini við Eystaru Vág, áðrenn hann vendi heim aftur móti býnum. Beint framman fyri hann koyrdi eitt sysktinabarn hjá honum. Bilførarin royndi at yvirhála sysktinabarnið, sum tó setti ferð á, og teir báðir koyrdu tí lið um lið heim eftir Havnagøtu.

Tá ið teir báðir nærkast Café Natúr, varnast bilførarin, at hann ikki megnar framvið sysktinabarninum og heldur ikki sleppur aftur um hann aftur. Hann fer tí vestur um Café Natúr, hóast hetta er ímóti ferðsluni. Bilførarin segði í Føroya Rætti, at hann ikki helt nakran bil kom ímóti, tí at hann ikki sá ljósglæmu frá nøkrum lyktum í vegginum hinumegin caféina. Men ein bilur kom koyrandi, og tí gjørdist talan um ein harðan samanstoyt. Tíbetur hendi eingin størvegis fólkaskaði, men báðir bilarnir fingu stóran skaða.

Í rættinum segði Linda Hesselberg, ákæri, at tað var eitt undur, at fólkaskaðin ikki var størri, og tað kundi eins væl enda við, at onkur lá eftirá. Hon helt ikki, at tað var bilføraranum fyri at takka, at skaðin ikki gjørdist størri, og hon kravdi tí harða revsing.

### Harmaðist tilburðin

Ákæruvaldið kravdi, at bilførarin verður dømdur í minsta lagi 40 daga treytaleysa fongsulsrevsing, og at hann verður dømdur at missa koyrikortið í hálvtannað til tvey ár treytaleyst. Linda Hesselberg segði í rættinum, at hon fegin vil hava Føroya Rætti at revsa bilføraran hart og harvið geva eina greiða ábending um, at slík skilaleys koyring ikki verður góðtikin.

Verjin hjá tí ákærda, Poul Hansen, helt ikki, at tað var neyðugt at døma ákærda treytaleysa revsing, tí maðurin ikki er revsaður áður. Somuleiðis helt verjin, at tað eigur at ávirka revsingina, at ongin stórvegis fólkaskaði var í sambandi við tilburðin.

Dómur fellur í málinum komandi mánadag.

# Flest píkadekk í Norðstreymoy



*Føroyskir bilførarar skoða bilar sínar væl. Flestu píkadekk eru í Norðstreymoy, meðan flestu vetrardekkini eru í Vágum og Eysturoy*
*(savnsmynd)*

**Eitt yvirlit frá Landsverki um vetrarferðsluna vísir, at nýtslan av píkadekkum og summardekkum er fallandi, meðan talið av vetrardekkum er í støðugum vøkstri.**

FERÐSLA
*Snorri Brend*

**Dekk:** Hetta er tíðin tá nógvir bilførarar skifta - ella kanska longu hava skift - til vetrardekk.

So skjótt sum fyrsti kavin kom høvdu dekksølurnar meiri enn úr at gera við tænastuni at skifta dekk. Og onkustaðni hevur ein eisini fingið sær eitt serstakt dekkhotell.

Tað eru kortini ikki allir bilførarar sum skifta frá summardekkum til vetrardekk: Yvirilitið frá Landsverki vísir nevniliga, at tað vóru 27 % av bilunum sum koyrdu við summardekkum seinasta vetur.

Einki verður sagt um hvaganí júst hetta talið stavar, men tað er tó ein sannroynd at vegirnir verða rættiliga væl saltaðir í Havn.

Hinvegin so vísir yvirlitið, at flestu bilarnir við píkadekkum finnur ein í Norðstreymoy, meðan flest vetrardekk eru at finna á bilum í Vágum og Eysturoynni.

Kanningin hjá Landsverki varð gjørd í desember mánaði í fjør og eisini í februar og apríl í ár. Kannaðir vórðu 28 % av teimum íalt 20.367 persónbilunum í landinum.

Hugt varð eftir bilum á støðum kring alt landið, har nógv akfør eru, t.d. við stór parkeringsøkir, skúlar, fiskavirkir, stórar handilsfyritøkur og aðra staðni.

### Salting

Henda forvitnisliga kanningin vísir greitt, hvussu føroyingar hava skøtt bilar sínar tey seinastu 15 árini.

Hyggur ein t.d. eftir nýtsluni av píkadekkum, so er henda lækkað úr 44% í 1997 niður í 38% seinasta vetur.

Hetta sama ger seg galdandi fyri nýtsluna av summardekkum, sum í sama tíðarskeiði er farin úr 40% og heilt niður í 27%.

Hinvegin so hevur nýtslan av vetrardekkum verið alsamt hækkandi í sama tíðarbili - úr 16% í 1997 til heili 36% farna vetur.

Sagt verður, at hóast nógvir føroyingar skoða bilar sínar við píkadekkum, so er talið kortini munandi lægri enn í grannalondum okkara. - Og hetta hendir, hóast vit eisini salta minni enn grannalond okkara, sigur Landsverk.